# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Niels Holm Jacobsen farin



Dagin fyri Allahalgannadag bera hvalbingar ein av sínum merkismonnum úr Vitninum og út í Leirabø at leggja til hvíldar saman við teimum sambygdarfólkum, sum eru farin hiðani undan Nielsi Holm Jacobsen.

Niels Holm varð føddur við Neyst í Hvalba ein hásummardag, 22. juli 1922, sonur Elisabeth, fødd Poulsen, og Jákup Jacobsen, millum hvalbingar kendur sum Jákup í Skálavík, men uppruna-liga ættaður úr Leynum.

Niels Holm var næstyngstur av 5 systkjum og var sum bert 3 ára gamal fyri teirri lagnu, at missa mammuna av havhesta-sjúku. Tað at verða móður- ella faðirleysur var hjá børnum tá, ofta úr stórum systkinaflokkum, meiri vanligt enn í okkara tíð. Nú er so mangt í lívinum blivið lættari av Guðs náði og av tí tímiliga framburði, sum vit her á landi eru vorðin signað við.

Tann framburður, sum vit føroyingar í dag njóta gott av, er lutvíst komin av tí stóra verki og teimum virðum, ið ættarliðið hjá Nielsi Holm og úrmælingarnir í tí gjørdu sítt til at skapa við sínum áræði og við at leggja kropp til.

Tað uddi við røskum fólki í Hvalba. Har var helst minni lætt enn manga aðrastaðni at skáka sær undan lívsins skyldum. Tann, sum royndi at sleppa sær undan at bera sín part av førninginum, fekk tað at vita við ómjúkum orðum. Tað galt um at verða taldur millum menn í lívsins verki á sjógvi sum á landi.

Hvalbøur er størsta markatalsbygd í Føroyum og vælabygd frá gomlum. Hon fekk toyggið í sjórænaratíðini, men dró eisini gott fólk at sær. Hon hevði sum nakrar aðrar føroyskar bygdir, eitt nú Viðareiði og Vágur, tann fyrimun, at haðani var tvírøtt, so til bar at rógva út bæði eystur- og vestureftir eftir ættini.

Hvalbingar í ættarliðinum hjá Nielsi Holm vórðu mintir og hesa stoltu siðvenju frá fornari tíð við at eygleiða tað frábera bygningsverkið úr laðaum gróti, lendingina, bátadráttin og neystini á Fiskeiðinum, sum enn vekja undran hjá teimum, sum vitja har vesturi.

Niels Holm fór sín fyrsta túr til skips í 1939 við City úr Vági, sum rokskiparin Gunnar Danielsen førdi. Seinni slapp hann við trolaranum Norðbúgvanum hjá Uvak, sum Hans Pauli í Hvannasundi, førdi undir krígnum. Tað var manndómsroynd og prógv at sleppa við so góðum skipum. Góð byrjan í lívsins skúla.

Nakað eftir hetta fekk Niels tuberklar og varð innlagdur á bróstsjúkrahúsinum í Hoydølum og seinni á Revsnes sanatorium næstu 2-3 árini.

Men hann tugdi lív og kom aftur til Hvalbiar at menna seg aftur. Eldri fólk minnast enn, hvussu lættur og væl hýrdur í takksemi fyri lívið hann flutti seg á tveimum høkjum í bygdini og royndi eftir førimuni at taka lut í dagsins verki.

Í 1948 tók Niels Holm skiparaprógv, fiskaði og førdi skip. Í 1954 fór hann við hvalabátinum Sirru við Áir. Tey, sum plagdu at lurta eftir Tórshavn Radio í 50-árunum, minnast hansara kláru og hørðu hvalbiarrødd, tá hann kallaði á hinar bátarnar at spyrja og geva tíðindi um støðu, vánir og veiði hjá hvør øðrum. Hann var millum teir seinastu í hesi fyri føroyingar flestar so spennandi veiði, tá hann so seint sum í 1966 førdi Sumba eftir stórhvali.

Hvalbingar brutu í áratíggju kol í Prestfjalli, og teir flestu arbeiddu í kolinum við sama ágrýtni, treysti og dirvi, sum teir royndust á sjónum. Niels Holm var uppi í hesi vinnu og førdi eina tíð kolabátin Stapan, sum sigldi millum oyggjarnar við kolafarmi.

Niels kom tíðliga í lívinum til persónliga trúgv á Jesus og gekk høgt upp í frelsuverkið alt lív sítt.

Í 1954 giftist hann við Silvurbjørg, fødd Olsen, av Tvøroyri. Teimum untist tó ikki at fáa børn, og bert 20 ár seinni misti hann konuna í góðum árum.

Frá ungum aldri var Niels innløgumaður, óførur til bakka og útróðrar. Fáur kendi sum hann streym og fiskileiðir kring Føroyar og var dugnaligur navigatørur.

Eftir at hava ført hvalabát nøkur ár keypti Niels saman við fleiri hvalbingum útróðrarbátin Glyrvarberg. Fiskieydnan var við honum eisini hesi árini. Seinni sigldi hann við trolarunum Hallarkletti og ídnaðarskipinum Gudmundi í 1970-árunum.

Hesin sterki og kimiligi maðurin mátti tó sanna, at heilsan krevur sítt. Hann vann á fyrra álopinum. So fyri hann var heilsan ikki eittans, men heldur í tveimum. Seinnu ferð, tað var í 1980-árunum, tuberklarnir gjørdu vart við seg, mátti hann taka av ferðini og boyggja seg fyri árum og aldri. Hann lá í seingini í uml. eitt ár. Men so var hann frammi og úti aftur, einum røskum hvalbingi líkt.

Seinastu mánaðirnar búði Niels á sambýlinum í Hvalba og treivst sera væl har.

Hvalbingar høvdu so stórt álit á Nielsi Holm, at teir valdu hann í bygdarráðið tvær setur, frá 1950-58, tá hann tók seg úr tí arbeiðinum, tí sambygdarfólk og suðuroyingar annars valdu hann inn í løgtingið at umboða oynna. Niels sat á løgtingi í tvey valskeið, frá 1958 til 1966.

Á tingi minnast vit hann sum sera ramligan og lívligan debattør. Hann hevði stutt fjús, men tað stakk ikki djúpt, sum tað sømir seg bragdarmanni, og hann var líka skjótt blíður og fryntligur aftur. Neistarnir fuku frá, tá hann tók lut í orðadrátti um tey mál, sum vóru uppi í 50- og 60-árunum. Hann hevði ta gleði at sita á tingi, tá fyrsti samferðslutunnilin, tann millum Trongisvág og Hvalba varð gjørdur.

Serliga errin og fegin var framburðs- og veiðimaðurin, Niels Holm, tá hann í samgongu á løgtingi var við til at flyta føroyska fiskimarkið út á 12 fjórðingar í 1964. Tað helt hann, og vísti sjálvur í verki sum fiskimaður, vera eitt hitt størsta menningarátak fyri vøkstur og trivnað í Føroyum í hansara tíð.

Nú var so lívskvøldið hjá Nielsi Holm Jacobsen komið, og hann hevur staðið undir børu hesar kláru og á sín hátt vøkru heystardagar. Vit, sum eftir komu, heilsa og kenna takksemi móti megnarmanninum Nielsi Holm Jacobsen, nú hann legði lívsárarnar inn og fór heim til Harran og Silvurbjørg. Vit biðja samkenslu við tykkum, sum mist hava ein góðan og menskan skildmann.

Friður veri við minni hansara.

## Virgar 70



Virgar T. Dalsgaard bleiv føddur tann 1. november 1937. Hann er útbúgvin lærari og er ein av teimum fáu, sum eftir eru av tí sjáldsomu rasuni, sum eitur útisetar. Ikki tí, tað eru nógvir føroyingar, sum búgva í Kjøpinhavn, men teir eru ikki útisetar upp sama máta sum Tróndur Olsen, Janus Øssurson og Emil Joensen, sum legði navn til Mílafelagið. Og Karl Nolsøe ikki at forgloyma.

Eftir at hava fingið matematiskt studentsprógv var Virgar vikarur ymsastaðni, m.a. í Klaksvík, har hann hevði gott samarbeiði við teknaran Óla Petersen. Teir gjørdu tað satiriska heftið "Rukkulakkin", sum var nakað av tí besta av sínum slag.

Seinni bleiv Virgar lærari í Køge, og tað bleiv so hansara lívsstarv. Men tað tekur bara ein lítlan tíma at koyra til Kjøpinhavn – og har var Studentafelagið, Mílafelagið, Føroyingafelag, Føroyskir Sosialistar og annað mangt, sum hugaligt var at fara í hjá fólki, sum hevði vitan og hug og meiningar.

Virgar bleiv ein høvuðskraft í kabarettunum hjá Studentafelagnum í 60-unum. Ógloymandi eru sketchirnar um "Býrotið" (Gang Peter, Siggy og teir), og um sjálvstýrislandsstýrið (1962-66). Tað var í hesari perioduni, at ein leiðandi tjóðveldismaður var so óheldigur á fundi í Studentafelagnum, at hann kom at siga – tá ið hann bleiv spurdur um, hvussu tað gekst við sjálvstýrinum – at tað hevði eydnast landsstýrinum at steðga jólaheilsunum til Føroyar. Ná so, repliseraði Virgar, so verður kanska tað næsta stigið á sjálvstýrisleið, at tit fara at taka jólagleðina frá fólki.... Hetta dámdi fundarfólkinum. Tann presisa satiriska replikkin í rættari løtu á røttum stað.

Virgar er ein homo politicus. Hann er sosialdemokratur í hvørjari tægr. Og hann er tað av tí gamla slagnum. Hann plagar sjálvur at vísa á prinsipiell orð hjá P. M. Dam: lívsfrælsi, sum frælsi til at liva lívið uttan at vera nívdur av materiellari neyð, og so symbiosan, t.e. samlívið og samstarvið hjá danskarum og føroyingum í sama politiska ríkiskarmi, men við fullum mentanarligum sjálvræði hjá báðum pørtum.

Virgar hevur ein góðan og spískan penn. Hann hevur skrivað í Oyggjaskeggja og í donsk bløð, men ikki so nógv í tey føroysku bløðini, meðan hann hevði meir enn fult starv í Køge.

Tá ið so tann økonomiska kreppan kom í 1992, og vit í 1998 fingu fullveldis-samgonguna, sum vildi loysa frá Danmark, var tað sum, at hann raknaði við. Í nógvum drúgvum og hvøssum greinum í Sosialinum gjørdi hann upp við fullveldistankarnar og vísti á, at tað nettupp er í samstarvinum við Danmark, at Føroyar hava tað tryggast.

Hetta skal ikki skiljast so, at hann var betri við Danmark enn við Føroyar (Hvor smiler fagert den danske kyst....). Fáur er so kønur í Føroya søgu og samfelagsviðurskiftum, sum hann. Og tá ið tað kemur til føroyskt mál, hevur hann ikki sín líka. Hann hevur eisini fingið gott í beinini av øllum skálavíkingunum, hann hevði rundan um seg í barndómi og uppvøkstri. Tí vendir hann sær eisini hvassliga móti tí málreinsaríi, sum í dag er tann ringasta hóttanin móti okkara móðurmáli.

Virgar eru europeari. Tosar franskt og týskt og ferðast í hesum londum javnan. Heimføðiskapur, nalvaskoðan og isolatión eru ikki gevandi eftir hansara tykki. Og so er hann eisini humoristur, tá ið hann revsar brek og órimiligheitir. Tá ið egin politiskur flokkur fer av leið og ger tað mótsetta av tí, sum ætlanin var, so er kritikkur upp á sítt pláss. "Die Zeit schreit nach Satire", segði Kurt Tucholsky í 30-unum. Rætt er tað, at Virgar mangan hevur reiggjað ta tungu sleggjuna móti tí, sum hann uppfatar sum fávitsku og óðamannaverk. Men bestur er hann við sínum eksakta viti og spísku satiru. Til lukku við degnum!

**Gamlir vinir**